# Evangelisk fundarrøð í Klaksvík



*Leygarkvøldi› og sunnukvøldi› ver›ur stórt evangeliskt tiltak í KÍ-høllini í Klaksvík, sum Betesda skipar fyri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Rógvi Joensen sigur, at undanfarin ár hevur verið skipað fyri sonevndum syngið við sangløtum í KÍ-høllini saman við Vitanum, men hesaferð verður talan um evangeliskt møti við ymiskum sangkreftum og talarum**

FUNDARRØÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið og sunnukvøldið verður evangelisk fundarrøð í KÍ-høllini, sum Betesda skipar fyri.

Rógvi Joensen sigur, at fundirnir leygarkvøldið byrja klokkan 20, og sunnukvøldið verður byrjað klokkan 18.

Við á fundarrøðini verða ymiskar sangkreftir úr Betesda, og talarar verða Rógvi Joensen, Bogi Simonsen og onnur.

**Broytt í ár**

Rógvi sigur, at undanfarin ár hevur verið skipað fyri sangløtum í KÍ-høllini saman við Vitanum, sum er gospel-kvartettin í Betesda.

– Hetta hava verið sonevndar syngið-løtur, har Vitin hevur sungið, og felagssangur eisini hevur ljómað. Onkuntíð hevur verið skipað fyri drama – við onkrum boðskapi sum endamáli.

Men soleiðis verður tiltakið ikki hesaferð, sigur Rógvi.

– Eins og onnur ár, hava vit leigað KÍ-høllina hesar báðar dagarnar og hava í ár valt at hava eina evangeliska fundarrøð, sum vit rópa tað.

**Øll vælkomin**

Í KÍ-høllini leygarkvøldið og sunnukvøldið verður eisini kaffi at fáa, og Rógvi Joensen sigur, at øll eru meira enn hjartaliga vælkomin at verða við til evangelisku fundarrøðina hesi bæði kvøldini.

– Nógv fólk plaga at koma til tiltøkini í KÍ-høllini, og vit vænta, at soleiðis verður eisini hesaferð, sigur Rógvi Joensen.



# Ein skiftilast mitt á vegnum

Tá ið starvsfelagi okkara, Birgir W. Høgnesen, var á veg úr Vestmanna og norður til Klaksvíkar í morgun, sá hann, at hendan skiftilastin stóð meira ella minni mitt á vegnum oman til Syðrugøtu.

Nú ferðslan er vorðin so nógv, og fleiri keðiligar hendingar hava verið – eisini vanlukkur, har fólk hava latið lív – halda vit tað vera rætt av okkum at gera vart við og vísa á slíkar støður sum hesa.

Støður, sum kunnu gerast vandamiklar, um illa vil til.

Í mongun var ljóst, tá ið Sosialurin koyrdi fram við, men einki er at ivast í, at ein slík last so mitt á vegnum kann vera rættiliga vandamikil fyri ferðsluna í myrkri.

Vit sóu eingi skelti, sum siga frá, at lastin stendur á vegnum í Syðrugøtu.

Ein slík skiftilast er tung, og hon fer neyvan undan, um hon verður árend av persónbili.

Ivaleyst áttu vit øll at verið meira umhugsin, varin og nærløgd, tá ið vit arbeiða á vegnum – ella ferðast eftir vegunum kring um landið.

**- vilmund**



# ES tekur tøk fyri umhvørvið

**– Ein minking í útlátinum av CO2-gassi er av avgerandi týdningi í stríðnum móti veðurlagsbroytingum, heldur ES-nevndin, sum nú hevur lagt eitt uppskot fram um nýggjan orkupolitikk**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

ES-nevndin legði fyrr í vikuni fram eitt uppskot um nýggjan orkupolitikk, har eitt av høvuðsmálunum er, at útlátini skulu minka við 20% í mun til tað, tey vóru í 1990.

Tey mest týðandi málini, sum ES-nevndin ynskir at røkka á orkupolitiska økinum innan ár 2020, eru hesi:

- Útlátini av vakstrarhúsgassum skulu minkast við í minsta lagi 20% í mun til útlátini í 1990. Í dag er málsetningurin ein minking upp á 8% innan 2012.
- 20% av orkunýtsluni í ES skal nøktast við endurnýggjandi orkukeldum. Í dag nøkta endurnýggjandi keldur bert 7% av nýtsluni.
- Limalondini skulu sjálvi gera av, í hvønn mun tey ynskja at gera nýtslu av kjarnorku sum orkukeldu. Um kjarnorkuverk halda uppat, skulu aðrar orkukeldur, sum hava minni útlát, setast í staðin.
- Í minsta lagi 10% av ferðsluni í ES-londunum skal koyra við bio-drívevni.
- ES-londini skulu minka um CO2-útlátið.
- 12 stór royndarverk – við ongum útláti - skulu setast upp innan 2015, og innan 2020 skulu kolaorkuverk byggjast út við tøkni, sum minkar um CO2-útlátið.

**Samtykkjast fyrst**

Enn eru hesi glæsiligu mál bara nøkur uppskot, sum skulu samtykkjast av ráðharraráðnum í ES og í ES-parlamentinum, áðrenn tey kunnu førast út í lívið.

ES-nevndin ynskir eisini at gera nógv meira við gransking innan orku og orkukeldur.



# Leivdir av flogfarinum

Í Indonesia hava tey nú funnið leivdir av flogfarinum, Boing 737-400, sum fyri tíggju døgum síðan hvarv við 102 ferðafólkum umborð.

Tíðindastovan AP ber hesi tíðindi.

Tað var í gjár, at leitiog bjargingarlið komu fram á partar av flogfarinum í útnyrðingspartinum av Indonesia – á oynni Sulawesi.

Tað var leiðarin fyri leitingini, Eddy Suyanto, sum í gjár upplýsti, at teir høvdu funnið partar av ferðafólkaflogfarinum.

– Eingi fólk eru funnin, hvørki livandi ella deyð, sigur Eddy Suyanto.

Dagin eftir, at flogfarið hvarv, gingu søgur um, at 12 fólk vóru funnin á lívi, men seinni avsannaðu indonesar tíðindini og søgdu, at flogfarið kortini ikki var funnið.

**- vilmund**